Gongur strúkandi hjá James

James Olsen hevur nógv av gera í bólkinum hjá Erann DD, sum er eitt av heitastu nøvnunum í donskum tónleiki í løtuni

TÓNLEIKUR
Ey›un Klakstein

James Olsen hevur nóg miki› at takast vi› í Danmark í løtuni.

Myrki trummuspælarin spælir vi› í bólkinum hjá Erann DD, sum er eitt av heitastu nøvnunum í donskum tónleiki í løtuni.

Erann David Drori gav sí›sta dagin í oktober mána›i sína fyrstu solofløgu út undir navninum Erann DD, og á hesi fløgu er James Olsen ein av trummuspælarunum.

Fyrstu vikuna seldi fløgan 25.000 eintøk, sum hevur vi› sær eina sokalla›a gullfløgu fyri søluna. Sí›ani eru meira enn 10.000 eintøk afturat farin um handilsdiskarnar.

Stakfløgan Still Believing liggur hesa vikuna sum nummar átta á hitlistanum hjá Danmarks Radio, og fløgan hevur eisini sníkt seg langt upp á ø›rum donskum hitlistum.

–Ta› kann ver›a eitt sindur ilt at fylgja vi› í løtuni, tí nógv er á skránni, men ta› kann eg í grundini bara fegnast um, sigur James Olsen.

Mynd: Jonhard Hammer

Hendir nógv

Í gjár skuldu James og hinir í bólkinum spæla fyri donsku fjølmi›lunum, og í dag ver›ur konsert fyri l‡singafyritøkum og fólki innan hesa bransju.

– Ta› hendir nógv í løtuni. N‡ggja fløgan hjá Erann DD hevur veri› sera væl móttikin, og hann er ein populerur sangari í Danmark, sigur James Olsen.

– Ta› er stuttligt at fáa kjansin í einum slíkum bólki, tí ta› eru nógvar avbjó›ingar, og nógvur eftirspurningur er eftir bólkinum.

Erann DD – vi› James Olsen handan trummurnar – skal spæla til ymiskar konsertir í Danmark í tí›ini, sum eftir er av hesum árinum, og hesar konsertir halda fram í komandi ári.

Roynir seg solo

Erann Drori er uppvaksin á Eysturbrúgv í Keypmannahavn, og hann er kendur kring alt Danmark fyri sín leiklut í bólkinum Drori-Hansen Furniture, sum gav fløgu út í bæ›i 1995 og 1996.

Á›renn hetta var hann orkufullur frontma›ur í Zapp Zapp, sum gjørdi um seg fyrst í 90'unum.

Nú hevur Erann sett hol á sína solokarrieru, og ta› ger hann vi› millum anna› James Olsen í sínum bóki. James og Erann hava eisini samstarva› í Drori-Hansen Furniture.

N‡ggja fløgan hjá Erann DD er upptikin og løgd til rættis í Keypmannahavn, Stockholm og Køge.

Rappar eisini

James Olsen er fegin um leiklut sín í Erann DD.

– Hetta er ta› longsta eg eri komin innan tónleik, og ta› er sera spennandi at ver›a vi›. Ta› er hugaligt, at tónleikarar úr Føroyum fáa kjansin í Danmark, sigur James Olsen.

– Ta› er eisini stuttligt at hoyra danir undrast á, at ta› finnast nógvir gó›ir tónleikarar í Føroyum. Teir halda ta› vera merkisvert, sigur hann.

Umfamt uppgávuna handan trummurnar hjá Erann DD, er James eisini vi› í ø›rum tónleiki. Hann hevur millum anna› júst fingi› uppgávuna at gera tónleikin til eina l‡singarherfer› hjá eini danskari klædnafyritøku. James skal gera tónleikin og rappa til myndirnar.

– Ta› kann ver›a eitt sindur ilt at fylgja vi› í løtuni, tí nógv er á skránni, men ta› kann eg í grundini bara fegnast um, sigur James Olsen.

John Lennon í Klaksvík

Fríggjakvøldi› ver›ur eitt minnistiltak fyri John Lennon í Klaksvík. Á skránni er fyrilestur og tónleikur

TÓNLEIKUR
Ey›un Klakstein

20 ár eftir at John Lennon var skotin til dey›is, ver›ur hann mintur vi› einum tiltaki í Klaksvík.

Tiltaki› ver›ur í hølum hjá Nor›oya Fornminnasavni, og á skránni er fyrilestur og tónleikur.

Bergur Rasmussen fer at grei›a frá ymiskum úr lívinum hjá John Lennon, og ein serligt samansettur bólkur fer at spæla sangir, sum Lennon skriva›i í Beatles-tí›ini og seinni.

Bólkurin, sum rópar seg X-mas, spældi eisini fyri 10 árum sí›ani í sambandi vi› líknandi tiltak í Keypmannahavn.

Bólkurin er manna›ur vi› Rana Nolsøe, Hera Ellingsgaard, Erik Biskopstø og Høgna Klakstein.

John Lennon var skotin 8. desember í 1980, og ta› er júst á 20 ára degnum, sum er fríggjakvøldi›, at enski sangskrivarin ver›ur mintur.

Vóna fløguútgávu í Danmark

Tríggir føroyskir tónleikarar í Danmark arbei›a í løtuni n‡ggjum tónleiki, sum teir vóna kann hava vi › sær fløguútgávu í Danmark

TÓNLEIKUR
Ey›un Klakstein

Tríggir føroyskir tónleikarr, sum eru búsitandi í danska høvu›sta›num ella har á lei›, arbei›a í løtuni vi› n‡ggjum tónleiki í einum upptøkuhølum á Amager.

Teir tríggir – Ey›finn Jensen, James Olsen og Leivur Thomsen – taka í løtuni upp tr‡ løg, sum teir vóna kann hava vi› sær eina útgávu í Danmark.

Tónleikurin er moderna›ur, og blandar íblástur frá millum anna› R&B og Dance tónleiki saman til eina nútímans – og ikki serliga føroyska – eind.

– Tónleikurin kemur helst út í Føroyum fyrr ella seinni, men vit stíla eftir eini útgávu í Danmark, sigur James Olsen.

Fótin inn um

James Olsen hevur á ein ella annan hátt fingi› fótin inn um í tónleikalívinum í Danmark.

Hann er trummuspælari í bólkinum hjá Erann Drori, og hann er eisini umbi›in at gera tónleik í ø›rum sambandi.

Ta› kann kanska hjálpa teimum trimum føroyingunum at vinna fram í Danmark, men teir eru grei›ir yvir, at ta› er ein stór avbjó›ing at vinna sær ein fløgusáttmála í Danmark.

– Vit gera tr‡ demoløg, sum vit tó ætla at fáa so gó›, at tey kunnu gevast sum tey eru, og tey skulu so ver›a grundarlagi undir okkara arbei›i at vinna ein fløgusáttmála, sigur James Olsen.

Jólasølustevna á Kambsdali

Jólasølustevna verður um vikuskiftið á Kambsdali. Á skránni verða millum annað mótasýning og klovnar, sum fara at undirhalda børnunum

Leygardagin níggjunda, og sunnudagin tíggjunda december skipar ÍF fyri jólasølustevnu í ítróttarhøllini á Kambsdali.

Latið verður upp leygardagin klokkan 14, og Dan Reinert Petersen, løgtingsmaður, setir stevnuna kl. 15.

Á skránni verða millum annað klovnar, sum fara at undirhalda leygardagin, og Trøllapætur kemur at vitja sunnudagin. Eisini verður harmonikuspæl at hoyra, har fuglfirðingar fara at spæla.

Sunnudagin verða vísusangarar úr Klaksvík og kór úr Fuglafirði at hoyra á stevnuni.

Eisini verða mótasýningar. Sýningarnar verða báðar dagarnar klokkan 16 og klokkan 20. Á seinnu sýningini báðar dagarnar verða millum annað undirklæði sýnd fram, siga fyrireikararnir. Luttakandi handlarnir eru úr Klaksvík, Havn, Vestmanna og úr Eysturuynni.

Skipað verður fyri barnaansing, meðan stevnan er. Tað vera pedagognæmingar, sum fara at átaka sær at ansa børnum, meðan foreldrini hyggja seg um.

Ongum nýtist at ganga svangur á stevnuni. Pizzaria úr Runavík fer at vera á sjálvari stevnuni, umframt at cafeteria í høllini verður opið, har millum annað ber til at keypa smurt breyð. Sí annars lýsing aðrastaðni í blaðnum

ej

Jólasølustevnan 2000

í ítróttarhøllini á Kambsdali 09.-10. desember

SKRÁ:

Leygardagin 09. des.

Kl. 14.00 Jólasølustevnan letur upp
Kl. 15.00 Stevnan verður sett
Kl. 16.00 Mótaframsýning
Kl. 17.30 Klovnar
Kl. 19.00 Óli og Juul spæla harmoniku
Kl. 20.00 Mótaframsýning
Kl. 21.00 Niels, Petur Jacob og Hans Jacob undirhalda
Kl. 22.00 Sølustevnan letur aftur

Sunnudagin 10. des.

Kl. 15.00 Jólasølustevnan letur upp
Kl. 16.00 Mótaframsýning
Kl. 17.00 Vísusangur úr Klaksvík
Kl. 18.00 Trøllapætur
Kl. 20.00 Mótaframsýning
Kl. 21.00 Blandaða kórið úr Fuglafirði syngur
Kl. 22.00 Lutaseðlarnir verða drignir og sølustevnan endar

Skipað verður fyri barnaansing

Sosialurin - 311820

YVIRLIT yvir framsýnarar á jólasølustevnuni



1.	Curri	18 m²
2.	Sámal Bláhamar	6 m²
3.	Tempur	12 m²
4.	Ground Floor Anna	20 m²
5.	Parfumarí Ninni	12 m²
6.	Fløgubúðin Tutl	9 m²
7.	Maskulin	12 m²
8.	AD-import	12 m²
9.	Lampu- & gávubúðin	10 m²
10.	Leikur	15 m²
11.	Leikalund	15 m²
12.	Í. F. básur	2 m²
13.	Gastrolux	6 m²
14.	J.J. Teld	21 m²
15.	Leivur Ellingsgaard	6 m²
16.	Skó-hornið	12 m²
17.	Rafik'sa Pizza og Grill	12 m²
18.	Hárfríðkanardeildin á Tekniska skúla	9 m²
19.	Malaika	6 m²
20.	Sirri	10 m²
21.	Skósølan við Gøtugjógv	9 m²
22.	Giggi	12 m²
23.	Ungt virkið	12 m²
24.	Køkssentrið	24 m²
25.	P/f Esmar Simonsen	30 m²

Sosialurin - 311820